# Uppskot frá nevndini í RK til atkvøðugreiðslu á eykaaðalfundi og aðalfundi felagsins tann 25. februar 2023

Góðu limir

Sum lýst á www.rk.fo og á Facebook tann 20. januar, hevur Róðrarfelagið Knørrur eykaaðalfund og aðalfund í Tollbúðini leygardagin 25. februar klokkan ávikavist 18:30 og 19:00. Til fundirnar hevur nevndin niðanfyrinevndu uppskot til atkvøðugreiðslu, øll um broytingar í viðtøkum felagsins.

Uppskot frá limum til atkvøðugreiðslu skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi leygardagin, 18. februar 2023. Sendið við maili til rk@rk.fo ella við vanligum brævi til RK, Postboks 1062, 110 Tórshavn.

8. februar 2023
Eivy Olsen, forkvinna

## Uppskot frá nevndini til atkvøðugreiðslu á eykaaðalfundinum

### Broyting av § 10, stk. 2

Verandi orðing:
Stk. 2. Roknskapurin skal fyri aðalfundin vera grannskoðaður av tí grannskoðara, ið varð valdur á seinasta aðalfundi. Grannskoðarin skal vera góðkendur. Grannskoðarin kann ikki vera nevndarlimur.

Nýggj orðing:
Stk. 2. Roknskapurin skal fyri aðalfundin vera áteknaður av tí grannskoðanarvirki, ið varð valt á seinasta aðalfundi. Grannskoðanarvirkið skal vera góðkent. Grannskoðanarvirkið skal hava meiri enn ein grannskoðara í starvi.

Viðmerkingar:
Tríggjar broytingar eru í nýggju orðingini. Hin fyrsta, at heldur enn at vera grannskoðaður, skal roknskapurin vera áteknaður, t.e. góðkendur. Hetta er munin bíligari og tó roknskaparliga trygt fyri felag okkara. Onnur broytingin er, at í staðin fyri grannskoðara skulu vit velja grannskoðanarvirki, tí berst tá einum grannskoðara frá, kann annar taka yvir. Vit tryggja okkum henda møguleika við at áseta, at grannskoðanarvirkið skal hava meiri enn ein grannskoðara í starvi. Triðja broyting strikar ásetingina um, at grannskoðarin ikki kann vera nevndarlimur, tí hetta er longu fyriskrivað í løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir. Sí t.d. § 22 í lógini.

## Uppskot frá nevndini til atkvøðugreiðslu á aðalfundinum

### Broyting av § 5, stk. 1, 1. pkt.

Verandi orðing:
§ 5. Aðalfundurin er ovasti myndugleiki felagsins og verður hildin einaferð um árið.

Nýggj orðing:
§ 5. Aðalfundurin er ovasti myndugleiki felagsins og verður hildin einaferð um árið, í fyrsta lagi 15. januar, í síðsta lagi 15. februar.

Viðmerkingar:
Aðalfundur felagsins hevur stundum verið hildin síðst í desember, áðrenn roknskaparárið er liðugt. Fyri at sleppa undan hesum, verður skotið upp at áseta nevndu tíð fyri, nær aðalfundurin kann vera.

### Broyting av § 5, stk. 4

Verandi orðing:
Stk. 4. Innkalling til aðalfund ella eykaaðalfund verður í seinasta lagi tvær vikur fyri fundin kunngjørd í fjølmiðlum, limablaði ella við serligum skrivi, ið verður sent limunum.

Nýggj orðing:
Stk. 4. Innkalling til aðalfund ella eykaaðalfund verður í seinasta lagi tvær vikur fyri fundin kunngjørd limunum á hóskandi hátt.

Viðmerkingar:
Broytingin skal geva okkum møguleikan at nýta tey samskiftisamboð, sum hoyra tíðini til.

### Broyting av § 6, stk. 1, 1. pkt.

Verandi orðing:
§ 6. Allir limir felagsins kunnu koma á aðalfund.

Nýggj orðing:
§ 6. Bert limir, sum hava goldið limagjald, kunnu koma á aðalfund.

Viðmerkingar:
Nevndin heldur broytingina vera rímiliga. Sambært § 4, stk. 3 og 4, í viðtøkunum ber longu til at fremja regluna í verki við at strika limaskapin hjá tí, sum ikki rindar limagjald, og harvið sýta honum at koma á aðalfund. Hetta er heldur hvasslig framferð, og tí skjóta vit broytingina upp. Hon er greið, røkkur sínum endamáli og letur eisini upp fyri møguleikanum at gjalda limagjaldið við dyrnar.

### Broyting av § 9, stk. 1

Verandi orðing:
§ 9. Aðalfundurin ásetir limagjaldið fyri komandi ár, og limagjaldið skal vera goldið í seinasta lagi tann 25. apríl í hesum ári. Vil persónur lima seg inn sum hvílandi lim í felagið eftir tann 25. apríl, verður gjaldsfreistin ein mánaður. Vil persónur lima seg inn sum virknan lim eftir 25. apríl, verður limagjaldið at gjalda beinanvegin.

Nýggj orðing:
§ 9. Aðalfundurin ásetir limagjaldið fyri tað ár, aðalfundurin verður hildin. Gjaldsfreistin er 1. mars í hesum ári. Vil persónur lima seg inn sum hvílandi lim eftir 1. mars, er gjaldsfreistin ein mánaður. Vil persónur lima seg inn sum virknan lim eftir 1. mars, verður limagjaldið at gjalda beinanvegin.

Viðmerkingar:
Tvær broytingar eru. Hin fyrra tekur burtur ivan um, hvørt talan er um limagjaldið fyri verandi ár ella næsta ár. Hin seinna loftar tí sannroynd, at nú verður vant alt árið, og tí kann gjaldið takast inn tað fyrr.

## Viðtøkur fyri Róðrarfelagið Knørr
www.rk.fo/vidtokur